# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingur til Hjartarehabiliteringina

Á Hjartarehabiliteringini er eitt starv á starvsbrøki 0,5 leyst at søkja til setan frá 1. november 2007 ella eftir avtalu.

Arbeiðsøki umfatar í høvuðsheitum um: hjartarehabilitering, primera og sekundera fyribyrging móti hjartasjúkum tætt samstarv við aðrar fakbólkar rehabilitering av hjartasjúklingum og fyribyrgjan, framt lutvíst í bólkum, lutvíst einsæris

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakliga vitan innan cardiologi
- arbeiðsroyndir innan røkt og viðgerð av hjartasjúklingum
- kunna arbeiða sjálvstøðugt og aktivt og alla tíðina kunnu søkja sær nýggja vitan innan arbeiðsøkið
- góð samstarvsevni
- teldukunnleika

**Vit kunnu bjóða**
- eitt sera áhugavert arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv
- innleiðslu
- møguleikar fyri fakligari menning

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Amy Ljósheim, sjúkrarøktarfrøðingur, lokal 6235 ella til Evu Mortensen, deildarleiðara, lokal 6250.

## Leiðsluskrivari til Bráðdepilin

Á Bráðdeplinum er eitt hálvtíðarstarv leyst at søkja til setan 1. oktober 2007.
Ert tú áhugað/-ur í einum spennandi arbeiðsdegi, har tú starvast í einum tvørfakligum umhvørvi, so er hetta møguliga nakað fyri teg. Bráðdepilin umfatar skaðastovu, akutta móttøku, intensiva deild, arkivið, umframt leiðbeining, sjúkraflutningstænastu og sjúklingaskrivstovu.

Leiðsluskrivarin hevur, í samstarvi við leiðandi yvirlæknan og leiðandi sjúkrarøktarfrøðingin, dagligu leiðsluna og fíggjarstýringina av deplinum um hendi.

**Ábyrgdarøki:**
- fíggjarstýring
- umsita tænastuferðir og uppgerð av tænastuferðum, bílegging av ferðaseðlum/íbúðum
- skrivari hjá depilsleiðsluni
- samstarv við aðrar fakbólkar og stovnar

Vit kunnu bjóða tær eitt starv, ið er í støðugari menning, eitt livandi og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi, ein arbeiðsdag har tú sjálv/-ur ert við at leggja tíðina til rættis.

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Bodil H. Laksafoss, læknaskrivara, lokal 5801 ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, naina@lsh.fo.

Umsóknarfreistin er 19. september 2007 kl. 12.00.

## Ljósmøður

Vegna farloyvi eru 3 fulltíðarstørv sum ljósmóðir leys at søkja til setan skjótast gjørligt, eitt starv árið út, annað til 18. juni 2008 og triðja til 31. august 2008, við møguleika fyri leingjan.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum ljósmóðir
- starvsroyndir innan viðgongu-, føðing og barsilstíð
- fleksibul og positiv
- hug til tvørfakligt samstarv

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Eyðfríð L. Jacobsen, leiðandi ljósmóðir, lokal, 5301, LSeydjc@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 21. september kl. 12.00.

## Læknaskrivarar til Med.

Á Medisinska deplinum eru 2 føst størv sum læknaskrivarar fulla tíð leys at søkja til setan 1. oktober 2007 ella eftir avtalu.

Førleikakrøv:
- útbúgving sum læknaskrivari
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleika

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Sæunn Ó. Hansen, leiðsluskrivara, lokal 6103.

Umsóknarfreistin er 17. september 2007 kl. 12.00.

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo






## Goymslufólk/bilførari

Vit sóknast eftir goymslufólki til goymslu okkara á Smyrilsvegi 5. Arbeiði umfatar alt vanligt goymsluarbeiði, eisini útkoyring av vørum.

Fyrimunur er um tú hevur tað stóra koyrikortið, men tó ongin treyt. Ring ella støkk inn á gólvi og hoyr nærri. Spyr eftir Andrass Drangastein.

**Damgar Heilsøla**
"Lítlandi góðvøru"
Smyrilsvegur 5 • 100 Tórshavn • Tlf: 359976

## Suðuroyar Tjóðveldisfelag

1. uppstillingarfundur verður í Jómsborg í Vági
sunnudagin 9. september 2007
kl. 17:00

**Nevndin**